# Hugnaliga **Malmø**

**Tað tekur bara góðan hálvan tíma við toki úr Keypmannahavn til Malmø. Ein hin hugnaligasti býurin í Norðurlondum ein summardag**

**KEYPMANNAHAVN**



**Yvir um Malmø kanalina er brúgv, har kendi Malmø vitin stendur. Á myndini sæst í bakgrundini Turning Turso til vinstru, og høgrumegin er í løtuni skipssavn**



**Túrar verða gjørdir gjøgnum kanilirnar í Malmø hvønn dag, og haðani ber til at síggja allan býin**



**Á Stórtorginum í Malmø stendur Karl Gustav X. á hestbaki**

Er mann í Keypmannahavn, so tekur tað ikki meira enn eina handavend áðrenn tit standa í miðbýnum í hugnaligu Malmø, har kafeir í hópatali eru at finna, um framt, at hugnaligi býurin hevur eitt rættiliga fjølbroytt handilslív, tá hugsað verður um, at »bara« 270.000 íbúgvar eru í býnum.

Orsøkirnar til, at býurin er so serliga hugnaligur er helst, at býurin ikki er so stórur, og tí er ikki so trongt í gøtunum, um samanborið verður við Keypmannahavn.

Tí er kanska eitt gott hugskot at fara yvir um vakru Oyrasundsbrúnna, um tú ætlar ein hugnaligan dag, tí køirnar eru stuttar í handlunum, fólkini eru rólig og blíð, samstundis sum tað er bíligari at keypa lutir í Svøríki enn í Danmark.

Hevur tú hug at síggja eitt sindur av býnum, so kann skjótt loysa seg á leiga eina súkklu, tí flatt er og leigu-súkklurnar nógvar.

So kanst tú eisini vitja fasinerandi bygningin »Turning Turso«, sum stóð liðugur í 2005, og nú er vorðin eitt ikon fyri býin. Bygningurin sær út sum eitt vanligt háhús, men er snaraður við klokkuni.

Tað var NCC, sum gjørdi bygningin fyri kommununa.

Bygningurin er hægsti bygningur, har fólk búgva, í øllum Evropa Samveldinum.

Skuldu tit verið so heppin at vera í Malmø longu í junimánaði, so verða fleiri dystir í HM-undankappingini hjá U-21 landsliðum, har tað millum annað ber til at síggja Zoran Tosic, sum verður spáddur eina sera bjarta framtíð í altjóða fótbólti, og hann er bara ein av fáu komandi stjørnunum, sum tað er møguleiki at síggja spæla í Malmø í summar.

Tað ber sjálvandi eisini til at fara ein túr í kanalunum við bátunum, ið gera túrar allan dagin, og tá tit ikki orka Malmø meira, so er bara at ganga yvir á tokstøðina. Tí tú skalt ongantíð bíða meira enn 20 minuttir til næsta tok til Keypmannahavnar fer.

Melda teg til Club Atlantic og
**VINN FERÐASEÐLAR**
og fá sertilboð sendandi við telduposti
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
**Melda til á: www.atlantic.fo**



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo